# Skálvíkingar í Starfighters finalu



*Brøðurnir Jens John Jakobsen, í miðjuni og Arngrím Jakobsen, uttast til vinstru, verða við bólkinum Pleaser, í finaluni í Starfigther kappingini, sum verður hildin á Skanderborg Festivalinum í ár*


## Starvsfólk

TIL SUNSET BOULEVARD Í SMS

**Fulla tíð**

Søkt verður fólki M/K í aldrinum 18 ár og eldri, til fulltíðarstarv - at byrja skjótast tilber. Ert tú opin, virkin, røkin og dámar væl at arbeiða, har tað veruliga hendir nakað, so er hetta tað. Tað ger onki, um tú hevur hóskandi royndir. Vit seta teg inn í okkara arbeiðsmannagongdir og eftir hetta gerst tú eitt av álitisstarvsfólkum okkara.
Vit gleða okkum at hoyra frá tær...

Send umsóknina til:
Sunset Boulevard, SMS, Postboks 1059, 110 Tórshavn,
ella far inn á www.sms.fo og útfyll eitt umsóknarskjal.

SUNSET Boulevard


**Í FINALU**
*Niels Uni Dam*

Brøðurnir Jens John Jakobsen og Arngrím Jakobsen verða við í finaluni í Starfigther kappingini, sum verður hildin á Skanderborg Festivalinum í ár. Tað er bólkurin Pleaser úr Slagelse, sum hesir báðir skálvíkingarnir spæla í, sum hevur tryggja sær sætið í finaluni, og givið teimum møguleika at kappast við 10 aðrar bólkar um ein útgávusáttmála.

Starfighters er ikki ókend kapping millum føroyingar, fyri tveimum árum síðan slapp prix Føroyar vinnarin beinleiðis í finaluna, og Gestir royndu seg tá í kappingini, tó uttan at veruliga gera vart við seg. Hetta er ein kapping, sum er rættuliga nógv í fjølmiðlunum, størsta danska útvarpsrásin P3 er ein av høvuðsfyriskiparunum. Tí er luttøka í finaluni ein møguleiki í sær sjálvum.

TV2 Øst hevur sett seg í samband við Pleaser, og ætlar at fylgja bólkinum í fyrireikingunum til kappingina, hetta gevur bólkinum ein sýnisglugga av teimum heilt stóru, og kann gerast heilt stóra gjøgnumbrotið hjá Pleaser.

Jens John og Arngrím hava verið virknir á danska tónleikapallinum síðan miðskeiðis í 90'árunum. Millum annað í bólkinum Adore, sum hevur givið eina fløgu út. Áðrenn teir fluttu niður, spældu teir eitt tíðarskeið í tungmálms bólkinum Saxony, bólkurin fekk nógvan íblástur frá Black Sabbath og spældi nógv fyrst í 90'unum. Millum annað á Futti á Ferð, Tungmálmi, Nýggjárs- og Ólavsøkukonsertum. Serliga var tað røddin hjá Jens Jón, sum longu tá bergtók áhoyraran, men eisini gávurnar at skriva fangandi løg vunnu teimum nógvar og trúgvar fjepparar.

Lagið hjá Pleaser "King of the Mountain" er popp rokkur og liggur tónleikaliga langt frá Saxony, men tað kemst ikki uttanum, at teksturin við kongum og drekum er í tráð við tungmálms bakgrundina hjá brøðrunum.




Vit heilsa
*Vivian Unadóttir*
vælkomnari í starv
á Salong Look

Salong LOOK
Landavegur 2 · Tórshavn · tel 31 88 48